

# Sungu og spældu í 24 tímar

## HITLIST

**15 tær bestu** (ÚF)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Páll Finnur Páll | Mín Russiski Vinur |
| 2 | Eyðun Nolsøe | Hvønn dag |
| 3 | Akon | Don't Matter |
| 4 | Eivør | Grát ei |
| 5 | Boys In A Band | Super Contagious |
| 6 | Rannvá Jacobsen og Angu | Drain me |
| 7 | Mika | Grace Kelly |
| 8 | Christina Aguilera | Candyman |
| 9 | Beyoncé ft. Shakira | Beatuiful Liar |
| 10 | Avril Lavigne | Girlfriend |
| 11 | Linkin Park | What I've Done |
| 12 | The Killers | Read My Mind |
| 13 | Fergie ft. Ludacris | Glamorous |
| 14 | Fallout Boy | Thnks Fr Th Mmrs |
| 15 | Sophie Ellis-Bextor | Catch You |

**Eykaløg**

| | |
|---|---|
| Nephew | Mexico Ligger I Spanien |
| Lena Andersen | Put Away Tomorrow For Today |
| The Fray | How To Save A Life |
| Bobby Valentino ft. Timbaland | |
| Amy Winehouse | Rehab |
| Tannbust Band | Mánamorgun |

**Tjeklisten** (DR)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nephew | Mexico Ligger I Spanien |
| 2 | Alphabeat | 10.000 Nights Of Thunder |
| 3 | Nelly Furtado | Say It Right |
| 4 | Mika | Grace Kelly |
| 5 | The Killers | Read My Mind |
| 6 | Volbeat | The Gardens Tale |
| 7 | Kaiser Chiefs | Ruby |
| 8 | Kenneth Bager ft. Gisli | Fragment Eight (The Sound Of Swing) |
| 9 | Arctic Monkeys | Brainstorm |
| 10 | Timbaland, Furtado & Timberlake | Give It To Me |
| 11 | Linkin Park | What I've Done |
| 12 | Justin Timberlake | What Goes Around Comes Around |
| 13 | My Chemical Romance | I Don't Love You |
| 14 | The Fray | How To Save A Life |
| 15 | Avril Lavigne | Girlfriend |
| 16 | Manic Street Preachers | Your Love Is Not Enough |
| 17 | Grand Avenue | The Outside |
| 18 | Nephew | Science Fiction og Familjen |
| 19 | Jens Unmack | Coke Lovebirds |
| 20 | Christina Aguilera | Candyman |

**Top of the Pops** (BBC)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Beyoncé ft. Shakira | Beatuiful Liar |
| 2 | Manic Street Preachers | Your Love Is Not Enough |
| 3 | Gym Class Heroes | Cupid's Chokehold |
| 4 | Timbaland, Furtado & Timberlake | Give It To Me |
| 5 | Avril Lavigne | Girlfriend |
| 6 | Ne*Yo | Because Of You |
| 7 | Mika | Love Today |
| 8 | Mark Ronson ft. D Merriwater | Stop Me |
| 9 | Groove Armada ft. Stush | Get Down |
| 10 | Hellogoodbye | Here (in Your Arms) |
| 11 | Akon | Don't Matter |
| 12 | Natasha Bedingfield | I Wanna Have Your Babies |
| 13 | Amerie | Take Control |
| 14 | Gwen Steffani ft. Akon | The Sweet Escape |
| 15 | Arctic Monkeys | Brianstorm |
| 16 | Alex Gaudion ft. Crystal Waters | Destination Calabria |
| 17 | Linkin Park | What I've Done |
| 18 | Dada ft. Sandy Rivera & Trix | Lollipop |
| 19 | The Fray | How To Save A Life |
| 20 | Fergie ft. Ludacris | Glamorous |

**Billboard**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Maroon 5 | Makes Me Wonder |
| 2 | Avril Lavigne | Girlfriend |
| 3 | Timbaland, Furtado & Timberlake | Give It To Me |
| 4 | T-Pain ft. Young Joc | Buy U A Drank (Shawty Snappin') |
| 5 | Ne*Yo | Because Of You |
| 6 | Carrie Underwood | I'll Stand By You |
| 7 | Fergie ft. Ludacris | Glamorous |
| 8 | Kelly Clarkson | Never Again |
| 9 | Akon | Don't Matter |
| 10 | Gwen Stefani ft. Akon | The Sweet Escape |
| 11 | Bone Thugs-n-Harmony ft. Akon | I Tried |
| 12 | Huey | Pop, Lock & Drop It |
| 13 | Diddy ft. Keysha Cole | Last Night |
| 14 | Carrie Underwood | Before He Cheats |
| 15 | Gym Class Heroes Ft. Patrick Stump | Cupid's Chokehold |
| 16 | Pink | U + Ur Hand |
| 17 | Mims | This Is Why I'm Hot |
| 18 | R. Kelly Or Bow Wow | I'm A Flirt |
| 19 | Beyoncé ft. Shakira | Beatuiful Liar |
| 20 | Ciara | Like A Boy |

sound



*Bæði tónleikarar og kór vóru enn væl fyri leygardag á middegi*



**Kórleiðarin hjá Ungum Stjørnuskotum var sannførdur um, at allir sangarar og tónleikarar, ið luttóku á 24 tímar konsertini herfyri hava gjørt framstig av upplivingini.**

KONSERT

Orð Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Ung Stjørnuskot spældu herfyri 24 tímar konsert í Posthúskjallaranum. Konsertin byrjaði kl. 20 fríggjakvøld og helt fram til kl. 20 leygarkvøld. Einastu steðgirnir vóru meðan ein tónleikari ella sangari fór av pallinum og ein annar kom á ístaðin. Planet.fo var tvær ferðir á gátt hesar 24 tímarnar.

Fyrsta vitjanin av um kl. 1 um náttina, tá vóru hølini á tremur við fólki, ið vóru komin at lýða á Ungu Stjørnuskotini. Hýrurin var enn sera góður millum tey, ið framførdu og tey, ið lýddu á. Ungu Stjørnuskotini lótu væl at fyrstu 5 tímunum. Eitt av Stjørnuskotunum staðfesti, at alt gekk uppá stás. Onkur var farin útum í Tórsgøtu at svala sær á, men eisini her var góður hýrur.

Hølini hildu á fram við at vera væl vitjað heilt til kl. 5 um morgunin og frá kl. 20 til 3.30 var fult hús, greiddi kórleiðarin Sigrið Sivertsen frá, tá vit aftur komu á gátt beint fyri middag leygardag. Nú var bert ein áhoyrari umframt blaðmannin, men sambært Sigrið hevði alla tíðina verið onkur áhoyrari.

## Ovfarakæti bar tey

Ung Stjørnuskot høvdu tá framført í út við 16 tímar uttan steðg, men tyktust enn at vera væl fyri. Gospel tónleikurin ljómaði út ímóti okkum, eitt stórt kór sang av hjartans lyst og hýrurin var góður

Kórleiðarin rópti á tey:

- Kom nú! Nú er bara ein vanligur arbeiðsdagur eftir! Henda upplýsing tyktist at gera hýrin uppaftur betur. Framførslan hevði ein nerva og høgan intensitet, ið mestur kom av ovfarakæti ella onkrum líknandi.

- Tú kemur akkurát, nú vit eru við at fáa lív í aftur, segði Sigrið og helt fram

- Vit hava havt eina down periodu frá umleið kl. 7, men nú byrja tey at vakna aftur, men var skjót at leggja afturat, at sangurin alla tíðina hevði ljómað.

## Eingin megnaði allan teinin

Fleiri av tónleikarunum og sangarunum høvdu hildið leingið á, men tá vit komu á gátt, var tað bert tann eina gentan, ið hevði verið vakin alla tíðina. Hon fór tó stutt eftir heim ein túr, og so kundi staðfestasta, at eingin megnaði allar 24 tímarnar.

Ungu Stjørnuskotini megnaðu tó málið, at spæla í 24 tímar uttan steðg, eftir kl. 15 var aftur fult hølið, og ovfarakætið gjørdist størri, og bar móðu unglingarnar heilt til kl. 20. Flest øll høvdu bert sovið ein tíma ella báðar tveir, frá tey fóru upp fríggjamorgunin til tey góvust leygarkvøldið.

Sigrið sigur við Planet.fo, tá vit fáa orð á hana, nú eitt sindur er fráliðið, at hon ikki er greið yvir, hvussu nógv løg vóru spæld, men fleiri hundrað metur hon.

- Tað er trupult at siga, um náttina gjørdist tað nógv jam og vit hava ikki gjørt nakað yvirlit, yvir hvussu nógv vit spældu, men fleiri nógv løg vóru spæld fleiri ferðir, greiðir hon frá.

Kórleiðarin var sera væl nøgd við tiltakið, og hevði varhugan av, at øll tey ungu somuleiðis vóru væl nøgd.

- Eg haldi, at tey øll eru ment sum sangarar, øll hava gjørt framstig, bæði tey royndu og tey, sum kanska fyrstu ferð royndu seg sum solist. Eg haldi, at øll vóru samd um, at tá tað ber til at halda geistin uppi, tá tú ert móður og syngur fyri nærum ongum áskoðarum, so ber lættari til at halda geistin uppi á vanligum konsertum, sigur Sigrið.